# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 19.06.2023 kl. 18.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Ronni Hammer |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| | Eir J. Norðberg |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Thorstein Thomsen |
| | Martin í Nesi |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

Eir J. Norðberg luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 1.

1. **102-51-2023: Innkomin tilboð uppá klæðing av skjøldri á Sandvíkar skúla.**

Hans Olaf Hentze, húsavørður hevur innheintað tvey tilboð uppá klæðing og bjálving av skjøldri á Sandvikar skúla.

| | | |
|---|---|---|
| Ívf JN Handverk | kr. | 58.400,00 v/MVG tilfar og arbeiðsløn |
| PI Handverk | kr. | 37.000,00 v/MVG tilfar og arbeiðsløn |

**Trivnaðarnevndin 13.06.2023:**
Nevndin hevði onki tilmæli.
**Fíggjarnevndin 19.06.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av lægra tilboðnum frá PI Handverk.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

2. **102-54-2023: Tilboð uppá máling av skjøldrum á Hvalbiar skúla.**

Forkvinnan í Trivnaðarnevndini hevur biðið um tilboð uppá máling av skjøldrum á Hvalbiar skúla.

| | | |
|---|---|---|
| Vágs Litbúð | kr. | 44.000,00 uttan MVG máling og arbeiðsløn |
| Óli Jensen | kr. | 35-40.000,00 uttan MVG máling og arbeiðsløn |

**Trivnaðarnevndin 13.06.2023:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðnum frá Vágs Litbúð.
**Fíggjarnevndin 19.06.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Óla Jensen, málarameistara.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini og taka av tilboðnum frá Óla Jensen.

3. **<u>102-53-2023: Tilboð uppá stoypi- og lendisarbeiði av túni við Hvalbiar skúla</u>.**

Innkomið tilboð frá Sp/f MTV-Byggivirki uppá stoyping av túni við Hvalbiar skúla til viðgerðar.

| | | |
|---|---|---|
| Sp/f MTV-Byggivirki | kr. | 99.200,00 uttan MVG |

**Trivnaðarnevndin 13.06.2023:**

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Sp/f MTV-Byggivirki.

**Fíggjarnevndin 19.06.2023:**

Einmælt samtykt at mæla til at taka av hesum tilboði.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og taka av tilboðnum frá Sp/f MTV-Byggivirki kr. 99.200,00 uttan MVG.

4. **<u>102-52-2023: Innkomin tilboð uppá vegin gjøgnum Garðsenni</u>.**

LBF, ið stendur fyri útbjóðingini av vegnum gjøgnum Garðsenni, hevur boðið 3 arbeiðstakarum at geva tilboð uppá arbeiðið, Sp/f E-Grevstur, Sp/f MTV-Byggivirki og Sp/f Bárður Hentze.

Inn komu tvey tilboð:

| | |
|---|---|
| Sp/f E-Grevstur | kr. 3.129.492,00 uttan MVG |
| Sp/f MTV-Byggivirki | kr. 3.549.454,00 uttan MVG |

**Vega- og havnanevndin 13.06.2023:**

Meirilutin í nevndini mælir til at taka av tilboðnum frá Sp/f E-Grevstur.

**Fíggjarnevndin 19.06.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Sp/f E-Grevstur.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og taka av tilboðnum frá Sp/f E-Grevstur kr. 3.129.492,00 uttan MVG.

5. **<u>102-55-2023: Umsókn um eykajáttan 2023 – 1. viðgerð</u>.**

Søkt verður um eykajáttan til gerð av vegnum gjøgnum Garðsenni og bátahylin á Hamranesi, íalt kr. 3.800.000,00. Eykajáttanin verður fíggjað við tøkum peningi.

**Fíggjarnevndin 19.06.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2023.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt.

6. **<u>102-94-2022: Byggisamtyktin fyri havnalagið í Nesi – innkomin mótmæli</u>.**

Uppskotið til broyting í byggisamtyktini fyri havnalagið í Nesi, ið varð samtykt av bygdarráðnum tann 27.02.2023, hevur ligið frammi til alment eftirlit frá 14.04.2023 til og við 05.05.2023. Broytingaruppskotið hevur ligið frammi á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Hvalbiar Kommunu, eins og tað er lýst í Sosialinum tann 14.04.2023.

Trý mótmæli eru komin inn í sambandi við broyting av byggisamtyktini fyri havnalagið í Nesi.

Hóast mótmælini ikki eru komin inn í sambandi við, at tað av bygdarráðnum samtykta broytingar-uppskotið til byggisamtyktina varð lagt fram tann 14.04.2023, hevur bygdarráðið valt at taka inn-komnu mótmælini við í viðgerðina.

**Tekniska nevnd 13.06.2023:**

Meirilutin í nevndini mælir til at taka undir við uppskotinum til svarskriv, við tí undantaki, at orð-Ingin viðvíkjandi flótibrúgv, sum kemur borgarum til gagns, verður strikað.

**Vega- og havnanevndin 13.06.2023:**

Martin í Nesi tekur ikki undir við skrivunum. Ronni Hammer vil hava, at orðingin viðv. flótibrúgv verður strikað ella broytt soleiðis, at hon stendur skrivað til S.N.B. at brúka.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um at fylgja tilmælinum hjá Teknisku nevnd. Fimm atkvøður vóru fyri hesum og er sostatt samtykt at taka undir við uppskotinum til svarskriv, ið ikki ganga innkomnu mótmælunum á møti. Niels Olaf Eyvindsson og Martin í Nesi tóku ikki undir við hesum.

7. **102-56-2023: Skúlabarnaflutningur.**

Trivnaðarnevndin hevur fingið tølini í sambandi við útreiðslur til hýruvognskoyring og skúlabarn-aflutning annars. Tølini fyri hýruvognskoyring eru tó ikki endalig, tá skúlaárið ikki er liðugt enn.

**Trivnaðarnevndin 13.06.2023:**

Nevndin hevur havt samband við hýruvognsførararnar, ið eru sinnaðir at halda áfram og foreld-rini eru nøgd við tænastuna.

**Fíggjarnevndin 19.06.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at halda fram við verandi skipan við hýruvognskoyring eina tíð aftrat og at sami sáttmáli við MP Bussar Sp/f verður longdur í eitt ár.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

8. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.45

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson

Eir J. Norðberg Martin í Nesi Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen